## Vestmenningar fara at gita á Bryggjuni



Spurnarkappingin ”Bryggj Quits” verður á Bryggjuni í Vestmanna leygarkvøldið klokkan 20. Í longri tíð hevur ”pubbin” Bryggjan í Vestmanna skipað fyri ymiskum tiltøkum, so sum stórskíggja, tá enska fótbóltskappingin er í gongd, dansi og av og á eisini spurnarkappingum. Leygarkvøldið 13. september kl. 21.00 skipar Bryggjan aftur fyri spurnarkapping, men hesaferð er tað ikki firmaspurnarkapping, sum tað var seinast, men heldur ein kapping, har øll kunnu luttaka. Seinast komu liðini frá flakavirkinum, fiskivinnuskúlanum, barnagarðinum, kommununi og frá vinnulívinum annars, so spennandi verða at síggja, um hesu eisini vera við hesaferð. Á liðunum kunnu í mesta lagi verða fimm leikarar, bæði kvinnur og menn – ung sum gomul. Til vinnandi liðið er eitt steyp, og til hvønn einstakan á vinnandi liðnum er eisini eitt steyp. Steypini letur Vest Pack. Tá spurnarklappingarnar eru, koma vanliga eisini onnur enn bara liðini, sum kappast. Øll eru vælkomin at lurta ella at heppa sítt lið leygarkvøldið, siga fyrireikararnir á Bryggjuni í Vestmanna.

# Sig hvat vantar Heðin

**- Tað er púra nýtt fyri mær, at tilfarið í sambandi við umsóknina um byggiloyvi á Krákusteini ikki er nøktandi, sigur Gullak Madsen**

BYGGILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Ein treyt e r, at bygningar skulu falla væl inn í grannalagið*

Í blaðnum týsdagin sigur Heðin Mortensen, at tilfarið í sambandi við umsóknina hjá Gullak Madsen um byggiloyvi til ein skrivstovubygning á Krákusteini langt frá var nøktandi.

- Eingin hevði fingið byggiloyvi við hasum skjalatilfarinum, segði Heðin Mortensen við Sosialin týsdagin.

Men Gullak Madsen sigur, at er tilfarið ikki nøktandi, so er tað nakað, sum er spildur nýtt fyri sær.

Eg og Palli Gregoriussen, sum er arkitektur hjá mær, høvdu fund við umsitingina hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og har fingu vit greitt at vita, at alt var í lagi við umsóknini og at tilfarið var fult nøktandi. Hetta var fyri 14 mánaðum síðani, og tí skilji eg ikki, at vit einki hava hoyrt um, at tilfarið ikki var nøktandi, og hvat tað er sum vantar, sigur Gullak Madsen.

Hann leggur stóran dent á, at hann ongan áhuga hevur í at viðgerða hetta byggiloyvi í fjølmiðlunum.

- Tit (Sosialurin, red.) ringdu til mín og spurdu, um eg hevði eina umsókn um byggiloyvi inni hjá Tórshavnar kommunu, og eg segði sum var, at tað høvdu vit, og í tí sambandi fíltist eg á, at tað eru 14 mánaðir síðani vit sendu hesa umsóknina inn uttan at hava hoyrt orð ella eið. Og tá so Heðin Mortensen nú sigur, at tilfarið ikki er nøktandi, so geri eg eina seinastu viðmerking til málið, sigur Gullak Madsen.

### Bjóðar húsini

Gullak Madsen sigur, at á teimum fundum, hann og arkitektur hansara hava havt við býráðið, er ongantíð komið fram, at nøkur skjøl ella nakað annað vantar í umsóknini um byggiloyvi.

- Tað hevur ymiskt annað verið frammi í tí sambandi. Eitt nú hevur býráðið fílst á, at ov nógv glas var í ætlaða skrivstovubygninginum, men í tí sambandi hava vit spurt um, hvørji ynski býráðið hevði í so máta uttan at teir hava ønt okkum aftur. Í øðrum lagi hevur verið ført fram, at býráðið arbeiðir við einari ætlan um at friða húsini, men fyri tað skulu vit hava svar upp á okkara umsókn, sigur Gullak Madsen.

Og ikki nóg mikið við tí.

- Um talan verður um at friða húsini, hava vit boðið kommununi, at teir kunnu keypa húsini fyri sama prís, sum eg havi latið fyri tey. Men heldur ikki í tí førinum hava vit hoyrt orð ella eið, sigur Gullak Madsen.

Hann sigur, at býráðið eisini hevur ført fram, at talan er um tveir matriklar, men heldur ikki tað er nøkur forðing.

- Vit kunnu jú bara byggja tveir bygningar við brandmúri ímillum. Tað ber væl til innan fyri byggisamtyktina, sigur Gullak Madsen.

Hann slær fast, at byggiumsóknin lýkur øll krøv og allar treytir, og at heldur ikki undanførslan um at byggja skrivstovubygningar á økinum heldur, tí annar av verandi bygningum framman undan er skrivstovuhølir.

- Og undir øllum umstøðum hevur kommunan skyldu at svara einari slíkari umsókn innan eina ásetta tíð, og tá umsóknin ikki lýkur krøvini mátti tað verið tað minsta at sagt okkum hvat tað er, sum vantar, slær Gullak Madsen fast.

# Kunnu ikki geva byggiloyvi

**Tað verður mælt frá at geva byggiloyvi til fyriliggjandi umsókn allan vegin ígjøgnum. Og tað byggir á fleiri ymisk viðurskifti. Men tað er kortini eingin umbering fyri, at viðgerðin hevur tikið alt ov langa tíð, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

BYGGILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen, borgarstjóri*

Teir eru ósamdir í flestu lutum í málinum um byggiloyvi til skivstovubygning, Gullak Madsen, umsøkjari, og Heðin Mortensen, borgarstjóri. Men í einum eru teir samdir: Viðgerðin av málinum hevur tikið alt ov langa tíð.

Sosialurin hevur viðgjørt hetta málið, og fyri at fáa rættiliga greiði á, hvat vendir upp og hvat vendir niður, hevur blaðið biðið um alment innlit í málinum.

Málið byrjar 12. juli 2007, tá J. P. Gregoriussen vegna Sp/f 25. seprember 1978 søkir býráðið um byggiloyvi til ein skrivstovubygning á matr. nr. 641 og 642a, Tórshavn. Hetta er við Skansavegin, eisini nevnt á Krákusteini.

Málið verður fyrstu ferð viðgjørt 4. august 2007 av millum øðrum tekniska stjóra og býararkitektinum. Í tilmælinum til Byggi- og býarskipanarnevndina siga teir báðir soleiðis:

»Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti. Núverandi bygningar hava høgt og miðalhøgt varðveitingarvirði, tí ognirnar eru sera sjónligar frá Tinganesi og tá komið verður til Havnar við skipi. Um nýggi skrivstovubygningurn verður loyvdur, hevur hetta við sær, at ein vælkend býar-mynd hvørvur.

Eisini verður víst til almennu byggisamtyktina Kap. IV. §25. stk.9 ið ásetur, at hús skulu í sniði og útsjónd yvirhøvur vera soleiðis, at tey fella væl inn í lendi og grannalag«

14. januar 2008 samtykir Byggi- og býarskipanarnevndin, at beina málið aftur til umsitingina til nærri kanningar.

Umsitingin kemur til, at broytingin í grannalagnum verður so munandi, tá ein stórur skrivstovubygningur kemur í staðin fyri tvey vanlig sethús, at:

»Mælt verður til at heita á umsøkjaran um at koma við nýggjari byggiætlan, har bygningurin onkusvegna verður býttur í tveir partar og í sniði ikki skilir seg ov nógv úr grannalagnum«.

### Ikki í miðlunum

Aftur 26. mars verður málið um byggiloyvi á Krákusteini viðgjørt, hesaferð av teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu. Har verður víst á eina røð av »feilum« í umsókníni. Fyri tað fyrsta verður mett, at tríggjar innkoyringar er ov mikið. Harnæst verður mett, at hóast talið av parkeringsplássum – 12 – lýkur krøvini í byggisamtyktini so verður sagt av royndum, at við støddini á bygninginum eigur talið á parkeringsplássum at verða 50. Bert eitt WC er á hvørjari hædd, sambært tekningunum, og tað er ov lítið.

Aftrat hesum verða nevnd ein røð av tekniskum lutum, ið ikki eru, sum teir eiga. Samanlagt sigur Tekniska deild:

»Mælt verður mælt frá, at lata byggiloyvi við støði í fyiliggjandi tilfari«.

Út frá tí tilfari, ið fyriliggur í málinum, er tað alt sum bendir á, at tilfarið ikki er nøktandi, eins og borgarstjórin hevur ført fram.

Men Heðin Mortensen er púra samdur við Gullak Madsen í einum: Hann ætlar sær heldur ikki at viðgera byggiloyvið á Krákusteini í fjølmiðlunum.

Heðin Mortensen sigur annars, at tað er rætt, at Gullak Madsen mótvegis sær persónliga hevur boðið kommununi, at keypa húsini á Krákusteini frá sær fyri sama prís, sum hann hevði útvegað sær tey fyri.

Heðin Mortensen segði seg annars ikki vita útveganarprísin, og tá blaðmaðurin nevndi ein prís á 10,5 milliónir krónur helt borgarstjórin, at tað neyvan er sannlíkt, at býráðið ynskir at nýta so nógvan pening til hetta endamálið.

Heðin Mortensen hevði annars ikki nakrar viðmerkingar til málið annað enn tað, at hann nú fer at syrgja fyri, at viðgerðirnar av byggimálum ikki frameftir skulu verða so drúgvar, sum tær hava verið í hesum førinum.